# AÐALFUNDUR 2005



ÍTRÓTTARSAMBAND FØROYA

# *Formansfrágreiðing*

# 2004-2005

*Til aðalfund Ítróttasamband Føroya 21. mai 2005*

Tú alfagra land mítt,
mín dýrasta ogn!
á vetri so randhvítt,
á sumri við logn,
tú tekur meg at tær
so tætt í tín favn.
Tit oyggjar so mætar,
Gud signi tað navn,
sum menn tykkum góvu,
tá teir tykkum sóu.
Ja, Gud signi Føroyar, mítt land!

Hin roðin, sum skínur
á sumri í líð,
hin ódnin, sum týnir
mangt lív vetrartíð,
og myrkrið, sum fjalir
mær bjartasta mál,
og ljósið, sum spælir
mær sigur í sál:
alt streingir, ið tóna,
sum vága og vóna,
at eg verji Føroyar, mítt land.

Eg nígi tí niður
í bøn til tín, Gud:
Hin heilagi friður
mær falli í lut!
Lat sál mína tváa
sær í tíni dýrd!
So torir hon vága
– av Gudi væl skírd –
at bera tað merki,
sum eyðkennir verkið,
ið varðveitir Føroyar, mítt land!

## Starvsnevndin

*Formaður:* Heðin Mortensen
*Næstformaður:* Sverre Midjord
*Skrivari:* Petur E. Petersen
*Varalimur:* John Kjær

*Ítrótta- og ungdomsráðgevi:* Sølvi R. Hansen
*Skrivstovufólk:* Ninna R. Ørvarodd
*Kassameistari:* Petur E. Petersen

## Stjórnin


*Formaður:*
Heðin Mortensen


*Næstformaður:*
Sverre Midjord


*Skrivari:*
Petur E. Petersen


*FSF:*
Óli Holm


*HSF:*
Niels Petersen


*FBF:*
Magnus Tausen


*RSF:*
Johannes Joensen


*SSF:*
Palli Ziskason


*FFS:*
Elin H. Joensen


*BSF:*
Michael Gram


*ÍSB:*
Jógvan Jensen


*JSF:*
Sofus D. Johannesen


*BTSF:*
Andras Nolsøe


*RF:*
Hjalmar H. Petersen


*SKF:*
Schandorff Vang


*DSNÍ:*
Tonny Brimsvík


*SST:*
Kjartan Egholm


FÍF: Sølvi Reinert
Hansen

*Grannskoðari: P/F Grannskoðaravirkið INPACT*

# Sersambondini

*Fótbóltssamband Føroya*
Óli Holm, form
Niklas á Líðarenda, varaform.
Rúni Heinesen
Jens Erik Magnussen
Bjarki Mohr
Magnus á Stongum
Karl Vidtfeldt

*Hondbóltssamband Føroya*
Niels Pedersen, form.
Eina Gudmundsen, varaform.
Niels Peter Bech
Rógvi Nielsen
Kristian Johansen

*Flogbóltssamband Føroya*
Magnus Tausen, form.
Trygvi Poulsen, kapp. stj.
Kristianna Dam

*Róðrarsamband Føroya*
Johannis Joensen, form.
Jan Herman Hansen, varaform.
Dánjal Petur Olsen, kassam.
Poul John Æðustein
Paula Eikholm

*Svimjisamband Føroya*
Palli Ziskason, form.
Eli Stakksund, kassam.
Helgi á Fløtti, skr.

*Føroya Fimleikasamband*
Elin Heðinsdóttir Joensen, form.
Katrin Abrahamsen, rytm.d.
Høgni R. Øster, reiðskapsd.

*Badmintonsamband Føroya*
Michael Gram, form.
Peter Gram, kassam.
Rani í Líð

*Ítróttasamband fyri Brekað*
Jógvan Jensen, form.
Johan Samuelsen, skr.
Jón á Steig, kassam.

*Judosamband Føroya*
Sofus Johannesen, form.
Jan Günther, varaform.
Kim Hansson, skr.

*Borðtennissamband Føroya*
Andrass Nolsøe, form.
Peter Niclasen
Rógvi Thorsteinsson

*Ríðisamband Føroya*
Hjalmar Petersen, form.
Eyðfinnur í Búðini, varaform.
Kjeld Nattestad

*Skjótisamband Føroya*
Schandorff Vang, form.
Simme Jacobsen, varaform.
Hans Jørn Nielsen, skr.

*Sambandið fyri Súkkling og Triathlon*
Kjartan Egholm, form.
Gunnar Dahl-Olsen, varaform.
Evald Rasmussen, skrivari

*Nýstovnaður Ítróttur*
Tonny Brimsvík, form.
Per Knudsen, varaform.
Harald Eirikstoft, skrivari
Kristian Dahl, kassam.
Kenneth á Argjaboða

*Frælsur Ítróttur Føroya*
Sølvi Reinert Hansen, form.
Niels Jákup Jakobsen, varaform.
Guttorm Sørensen, peningarøkil
Óli Olsen
Heri Ziska

# Formansfrágreiðing 2004-2005

Tað grør um gangandi fót í føroyskari ítrótt, og vit kunnu fegnast um økt virksemi á so at siga øllum økjum, umframt at gomul ítróttafeløg eru vaknað til lívs aftur og nýggj sett á stovn. Kring alt landið bæði sprettir og spírar ítróttin, myndaliga talað.

Framvegis kunnu vit staðfesta, at áhugin fyri ítrótti er størri og sterkari enn nakrantíð, so bæði virkin og minni virkin kunnu fáa sítt. Bæði tey íðkandi og tey, ið fylgja við, hava mong og góð ítróttatilboð at velja ímillum, og dag og dagliga eru fjølmiðlarnir á tremur við ítróttatíðindum av ymsum slagi.

At framgongd er at síggja og at ítróttin er so mongum so viðkomandi, er kortini eingin sjálvfylgja. Ótald fólk gera eitt stórt og virðismikið sjálvboðið arbeiði, ið gevur ítróttini góðar karmar og innihald.

Altavgerandi er, at ítróttin fær neyðugu politisku vælvildina, heldur enn at fótonglar verða settir, tí ítróttin livir í einum viðkvomum umhvørvi, ið byggir á eina ófatiliga orku og ótrúliga tíð, ið verður løgd í at skapa børnum, ungum og vaksnum ítróttaligar møguleikar og avbjóðingar.

Sosialt og heilsuliga hevur ítróttin eitt milliónastórt virði, samstundis sum einki enn hevur megnað at sett Føroyar á heimskortið í sama mun, sum ítróttin hevur tað. Tí mugu vit øll standa saman um henda gylta førning, okkum øllum er litið upp í hendur at bera víðari – betri, størri og sterkari, enn tá vit fingu hann upp í hendurnar.

Tann gleði, so mong hava av tí stóra ítróttaarbeiði, ið verður gjørt í Føroyum, má verjast og lívgast, tí uttan ítróttina var gerandisdagurin hjá mongum fátæksligur og tómligur, har hann nú er bæði innihaldsríkur og gevandi.



Avbjóðingarnar gerast bæði fleiri og størri, og tí er umráðandi, at ítróttini verða givnar bestu umstøður at mennast og taka seg fram. Hvør í sínum lagi kunnu vit koma við okkara klípi, samstundis sum vit altíð eiga at hava í huga, at drúgt er at byggja upp, men skjótt at bróta niður.

# ÍSF

## *Landskassastuðul*

Eins og tey mongu undanfarnu árini er játtanin til Ítróttasamband Føroya á løgtingsins fíggjarlóg framvegis óbroytt, tvær milliónir krónur. Hesin peningur er játtaður til rakstur av ítróttasambandinum og sersambondunum.

Aðrar inntøkur koma frá limagjaldi, gjøldum frá út- og sjónvarpi, Happadráttargrunninum og øðrum, og tá útreiðslurnar til raksturin eru drignar frá, verður restin býtt millum sersambondini soleiðis:

| **Sersamband** | **Upphædd** |
|---|---:|
| Fótbóltssambandið | 980.000 |
| Hondbóltssambandið | 163.000 |
| Flogbóltssambandið | 163.000 |
| Róðrarsambandið | 91.000 |
| Fimleikasambandið | 91.000 |
| Ítróttarsamband fyri Brekað | 91.000 |
| Svimjisambandið | 123.000 |
| Judosambandið | 91.000 |
| Badmintonsambandið | 91.000 |
| Borðtennissambandið | 91.000 |
| Sambandi Fyri Súkkling og Triathlon | 25.000 |
| Frælsur Ítróttur Føroya | 25.000 |
| Deilds. nýstovnaður ítróttur | 45.000 |
| Ríðisambandið | 45.000 |
| Skjótisambandið | 45.000 |
| **Íalt** | **2.160.000** |

*Býtið av Landskassastuðlinum 2004*

## *Ítróttaferðir*

Løgtingið hevur játtað 3,25 milliónir krónur til ítróttaferðir innanlands, men er henda upphædd væl minni enn í 2003, tá játtanin var 3,7 milliónir krónur. Hesa ferð hevur løgtingið spart og regulerað eftir nýtsluni, so játtanin tíverri er 450.000 krónur lægri í ár.

Vónandi standast ikki trupulleikar av lækkaðu játtanini til ítróttaferðir, men ein sannroynd er tað, at ítróttavirksemið kring alt landið er økt munandi, við tað bæði fleiri feløg og fleiri kappingar eru, so tað kann henda seg, at niðurskurðurin ger samlaðu játtanina ov lítla.

Annars kann enn eina ferð staðfestast, at nýggja skipanin við kortum, heldur enn teimum »gulu seðlunum«, hevur riggað væl. Ikki minst ger hon tað lættari hjá bæði ítróttaleiðarum og einstaklingum at ferðast til ítróttatiltøk kring landið, og somuleiðis tryggjar hon í størri mun, at játtanin ikki verður brúkt til annað enn ítróttaferðir.

## *Avtala við Atlantsflog*

Nýggj avtala er gjørd millum Ítróttasamband Føroya og Atlantsflog um ferðing uttanlands, so tey 15 sersambondini kunnu fáa avsláttur í kostnaðinum, tá ferðast verður á føroyskum veingjum í ítróttaørindum uttanlands.

Avtalan betrar møguleikarnar hjá føroyskum landsliðum at ferðast til tiltøk og kappingar uttanlands, umframt at høgligari verður hjá útlendskum landsliðum at koma hendavegin undir skipaðum viðurskiftum fyri fastan og sámiligan prís.

Sum heild er avtalan við Atlantsflog styrkjandi fyri føroyskt landsliðsarbeiði, umframt at møguleikarnir hjá føroyskum ítróttarfólkum at umboða og marknaðarføra Føroyar úti í heimi verða munandi betraðir.

## *Norðurlendskur stuðul*

Viðvíkjandi tí stuðulsjáttan, Norðurlendska Ráðharraráðið á hvørjum ári lutar millum Ísland, Grønland og Føroyar, er býtislykilin nú broyttur, so minni verður í okkara part.

Ísland hevur frammanundan fingið 50 prosent av hesi játtan, Føroyar 28 prosent og Grønland 22 prosent, men eftir at grønlendingar settu fram ynski um at fáa sama part sum føroyingar, er norðurlendska játtanin til føroyska ítrótt skerd tilsvarandi.

Nú er býtið 50 prosent til Ísland og 25 prosent í part til Grønland og Føroyar. Tað merkir ítøkiliga eina munandi lækking, tí í ár er føroyski parturin av játtanini 267.000 krónur, samanborið við 301.000 krónur í fjør.

Norðurlendska játtanin er býtt soleiðis millum ítróttagreinarnar:

| **Sersamband** | **Upphædd** |
|---|---:|
| Hondbóltssambandið | 50.000 |
| Flogbóltssambandið | 50.000 |
| Róðrarsambandið | 20.000 |
| Ítróttarsamband fyri Brekað | 40.000 |
| Svimjisambandið | 30.000 |
| Judosambandið | 20.000 |
| Súkkling og Triathlon | 35.000 |
| Frælsur ítróttur | 30.000 |
| Skjótisambandið | 15.000 |
| **Íalt** | **290.000** |

*Býtið av stuðlinum frá Norðurlendska Ráðharraráðnum 2004*

## *Ítróttavedding*

Ítróttaveddingin er framvegis fíggjarliga álitið hjá føroyskum ítrótti, og serliga eftir at nýggj avtala í 2003 var gjørd við Dansk Tipstjeneste, er føroyski parturin av útgoldna stuðlinum vaksin munandi.

Føroyar fáa nú ágóða eftir teirri upphædd, spælt verður fyri hjá Dansk Tipstjeneste í Føroyum. Umsetningurin og tað, sum føroyingar spældu fyri hjá Dansk Tipstjeneste í 2004, er á nøkulunda sama støði sum undanfarin ár.

Aðalfundur hevur júst verið í smápartafelagnum Ítróttavedding, og útlutingin av peningi til Ítróttasamband Føroya, landsstýrismannin við mentamálum og Føroya Ungdómsráð í ár er 10,2 milliónir krónur, sum er tað mesta nakrantíð.

Hesin stuðul verður býttur soleiðis, at Ítróttasamband Føroya fær seks milliónir og 120.000 krónur, landsstýrismaðurin við mentamálum tvær

milliónir 40.000 krónur og Føroya Ungdómsráð tvær milliónir og 40.000 krónur.

Í stjórnini í smápartafelagnum Ítróttavedding er tann broyting hend frá 1. februar í ár, at Heðin Mortensen, sum hevur verið stjóri frá byrjan, er farin í farloyvi, og Petur Elias Petersen er settur sum nýggjur stjóri.

| Sersamband | Partar | Upphædd |
|---|---|---|
| Fótbóltssambandið | 12 | 882.581 |
| Hondbóltssambandið | 8 | 588.387 |
| Flogbóltssambandið | 8 | 588.387 |
| Svimjisambandið | 6 | 441.290 |
| Róðrarsambandið | 4 | 294.194 |
| Fimleikasambandið | 4 | 294.194 |
| Ítróttarsamband fyri Brekað | 3 | 220.645 |
| Borðtennissambandið | 3 | 220.645 |
| Judosambandið | 3 | 220.645 |
| Badmintonssambandið | 4 | 294.194 |
| Skjótisambandið | 2,5 | 183.871 |
| Frælsur Ítróttur Føroya | 1,25 | 91.935 |
| Sambandið Fyri Súkkling og Triathlon | 1,25 | 91.935 |
| Deilds. nýstovnaður ítróttur | 2,5 | 183.871 |
| Ríðisambandið | 2,5 | 183.871 |
| **Íalt** | **65** | **4.780.645** |

*Býtið av veddingarpeninginum til sersambondini 2004*

## *Skattafríar samsýningar*

Í áravís hava fíggjarlig viðurskifti hjá ítróttafeløgum, tá um samsýningar umræður, verið skipað eftir einum rundskrivi frá 1991. Av tí at hetta rundskriv var heldur gamalt og ikki altíð tíðarhóskandi, setti Ítróttasamband Føroya seg í samband við Fíggjarmálaráðið um at fáa reglurnar í rundskrivinum endurskoðaðar.

Hesi áheitan tók Fíggjarmálaráðið væl ímóti og setti ein arbeiðsbólk at viðgera málið. Í hesum bólki sita Margretha Dalsgaard og Maibritt Johansen frá Toll- og Skattstovu Føroya og Petur Elias Petersen og Niclas Joensen frá Ítróttasambandi Føroya.

Umboðini hjá Ítróttasambandi Føroya hava gjøgnumgingið viðurskiftini hjá ítróttini og mælt til dagføringar av upphæddunum, so tær hóska betur til tey viðurskifti, sum eru í dag.

Skotið verður upp, at upphæddirnar, ið skattafrítt kunnu útgjaldast ítróttaleiðarum – tað veri seg venjarar, hjálparvenjarar, leiðarar, hjálparar, nevndarlimir og onnur – eru býttar í níggju ymsar bólkar, sum eru hesir:

1. Samsýning til venjarar
2. Samsýning til aðrar leiðarar, hjálparar og onnur
3. Telefon- og internetútreiðslur
4. Fyrisitingarligur kostnaður, so sum porto, skrivstovuhald, fundir og annað
5. Vasking og viðlíkahald av ítróttaklæðum
6. Samsýning til dómarar og linjudómarar, umframt at ferðaútreiðslur verða endurgoldnar móti kvittan
7. Koyripengar í egnum bili, upp til 10.000 kilometrar
8. Útreiðslur til mat fyri dagstiltøk, stevnur og annað, har persónur fer avstað í meira enn fýra tímar
9. Ferðing uttanlands

## *Dopinglóg í gildi*

Í desember 2004 samtykti Føroya Løgting lóg um forboð móti ávísum dopingevnum, hvørs endamál er at avmarka útbreiðsluna av dopingevnum. Sambært hesa lóg er forboð sett ímóti at framleiða, flyta inn, flyta út, selja, býta út og at eiga dopingevni, uttan tey eru tilskilað til sjúkuviðgerð ella gransking.

Ítróttasamband Føroya fegnast um, at lóggáva er komin á hesum øki, tí doping samsvarar ikki við meginreglurnar um, at í ítróttarørslum kappast øll á jøvnum føti, og at førleikin bert skal varðveitast og bøtast á náttúrligan hátt. Somuleiðis talar fyrilitið fyri heilsuni hjá ítróttafólki ímóti allari nýtslu av dopingevnum.

Seinnu árini hevur dopingtrupulleikin gjørt um seg í londunum rundan um okkum, men tíbetur hava føroysku dopingkanningarnar yvir ein kamb víst, at doping ikki er ein trupulleiki hjá okkum. Vónandi verður hann heldur ikki tað.

Kortini hevur tað avgerandi týdning fyri fyribyrgjandi arbeiðið, at ein lóg er komin í gildi á hesum øki í Føroyum. Lógin fevnir ikki um sjálva nýtsluna, men hevur tálmandi týdning, við tað at sjálv dopingevnini nú eru ólóglig í sjálvum sær.

## *Dopingroyndir*

Føroyska dopingeftirlitið hevur í mars og september 2004 tikið tilsamans 22 royndir av ítróttafólkum, og allar hesar royndirnar, sum vórðu tiknar undir venjing, vóru negativar. Somuleiðis eru í ár tiknar 12 royndir, men úrslitini av teimum eru ikki komnar enn.

Síðani fyrstu dopingroyndirnar vórðu tiknar fyri tveimum árum síðani eru tilsamans 65 royndir tiknar. Av teimum 53 royndunum, har úrslitið er kent, vóru allar negativar.

Dopingeftirlitsarbeiðið hjá ÍSF ger doping-eftirlitsnevndin, sum er mannað við seks fólkum, og eftirlitsnevndin ásetir nær og hvar eftirlitið verður gjørt. Innkalling til eftirlit kann verða annaðhvørt skrivlig ella munnlig.

Roynt verður at býta royndirnar soleiðis, at tveir triðingar eru frá venjing og restin er frá kappingum.

## *Útvarps- og sjónvarpsrættindi*

Samráðingar eru í gongd um nýggjan sáttmála um útvarps- og sjónvarpsrættindi, og hava fleiri fundir verið. Fyrst við Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya hvørt sær, og eftir samanleggingina fundir við nýggja stovnin. Gamli sáttmálin er farin úr gildi, men heldur tó fram, til nýggjur er gjørdur.

Miðað verður ímóti at fáa gjørt ein tvey ára sáttmála, ið serliga kemur teimum smærru ítróttagreinunum til góðar, so eisini tær verða sæddar og hoyrdar. Hetta verður mett hægri enn tær inntøkur, ið kunnu væntast at fáast burtur úr nýggja sáttmálanum.

## *Útlendingamálið*

Í sambandi við útlendingamálið, sum hevur fingið nógva umrøðu síðsta árið, hevur Ítróttasamband Føroya fleiri ferðir roynt at gjørt sína ávirkan galdandi, men verri enn so altíð við serligum úrsliti. Torført hevur verið at fingið landsstýrismannin í innlendismálum og myndugleikarnar annars at skilt, hvør støðan hjá føroyskum ítrótti veruliga er, tá talan er um útlendskar spælarar og venjarar.

Ítróttasamband Føroya kendi seg noytt at heita á landsstýrimálanevndina um at taka hetta málið upp, so loysn kundi fáast á tað, so málsviðgerðin aftur gjørdist í samsvar við góðan fyrisitingarsið, so hetta ikki skuldi fáa óbótaligan skaða fyri ítróttina. Nevndin kom til ta niðurstøðu, at málið ikki var nóg konkret til, at hon kundi viðgera tað, men í øllum førum elvdi nógva umrøðan av málinum til, at landsstýrismaðurin ikki tók øll tey stig, hann hevði ætlað sær.

Eftir stendur, at eingin broyting enn er hend, og tí noyðast ítróttafeløg at útvega sínum útlendsku spælarum ella venjarum 60 prosent av inntøkuni, meðan hini 40 prosentini kunnu útvegast gjøgnum annað arbeiði. Hetta er ein stór fíggjarlig og umsitingarlig byrða hjá ítróttafeløgunum, men so leingi onnur og nýtiligari skipan ikki fæst, er hetta teirra einasti útvegur.

Ítróttasamband Føroya fer framvegis at fylgja sera væl við gongdini í málinum, so tað ikki skal henda, at nøkur nýggj loysn verður smoygd niður yvir høvdið á okkum, ið vit ikki vilja hava.

## *Ítróttaálit*

Síðani á sumri 2003 hevur ein arbeiðsbólkur, settur av landsstýrismanninum við mentamálum, arbeitt við at orða eitt ítróttaálit. Skjøtil varð settur á arbeiði undir oyggjaleikunum á Guernsey, og ætlandi verður álitið liðugt fyri oyggjaleikirnar í Hetlandi í summar.

Endamálið við álitinum er at fáa lýst støðuna hjá ítróttini her og nú, fyri síðani at nýta ta lýsingina sum støðið undir eini meting av, hvussu umstøðurnar





hjá ítróttini kunnu betrast. Nortið verður við stórt sæð allar tættir, so sum felagslív, sersambond, feløg, samstarv við ymiskar myndugleikar og annað, so ítróttin verður lýst út í æsir.

Arbeiðsbólkurin hevur fingið frágreiðingar frá øllum sersambondunum, har tey lýsa sína støðu og greiða frá, hvat riggar væl og minni væl, umframt at tey hvørt í sínum lagi seta fram ynski um, hvat dentur eigur at verða lagdur á í framtíðini.

Í arbeiðsbólkinum sita Jóan Petur Hentze fyri Mentamálaráðið og Katrin Joensen og Sølvi Reinert Hansen fyri Ítróttasamband Føroya.

## *Kanning av sjálvbodnum arbeiði*

Hagtøl eru ikki sterkasta síðan hjá føroyskari ítrótt, og hetta hevur ikki minst víst seg, nú ein kanning av øllum tí sjálvbodna arbeiðinum innan føroyska ítrótt hevur verið í gongd síðstu tvey árini.

Roynt hevur verið at fingið til vega tøl og hagtøl frá ítróttafeløgunum, so finnast kann fram til, hvussu nógvir ólønir tímar verða brúktir til ítróttaarbeiði, men heldur striltið hevur gingist við at fingið tilfar til vega frá nógvum av feløgunum kring landið. Av tí sama hevur ikki enn borið til at gjørt nakra niðurstøðu ella meting av tí stóra sjálvbodna arbeiðinum, ið kann brúkast til almenna framløgu.

Alneyðugt er at fáa bygt upp eitt hagtalssavn, ið kann verða brúkt til at gera støðuna upp her og nú, eins væl og hetta tilfar í framtíðini kann verða brúkt sum samanberingargrundarlag, tá gongdin innan ítróttina og sjálvbodna arbeiðið skal lýsast.

Givið er, at tað er ikki smávegis tíð og orka, sum verður løgd í ítróttina kring landið, og fáur man ivast í, at ítróttin er størsta einstaka aktiv í føroyska samfelagnum, tá tað ræður um heilsufremjandi, fyribyrgjandi og sosialt arbeiði millum børn og ung.

# Altjóða samstarv

## *Oyggjaleikir í Hetlandi*

Í døgunum 9. til 15. juli 2005 verða oyggjaleikir í Hetlandi, og úr Føroyum fara tilsamans um 130 ítróttafólk, umframt venjarar og hjálparfólk.

Hesa ferð fara Føroyar at kappast í ítróttagreinunum badminton, bogaskjóting, borðtennis, fimleiki, flogbólti, fótbólti, frælsari ítrótt, skjóting, súkkling og svimjing.

Føroyski hópurin verður væntandi ein av teimum størri saman við hópunum hjá Isle of Man, Isle of Wight og vertslandinum Hetlandi, og av tí at so fá gistingarplásss eru á landi, skulu føroysku ítróttafólkini búgva umborð á ferðamannaskipinum MV Athena.

Greitt er, at í 2007 skulu leikirnir vera á Rhodos, sum ikki hevur verið vertur fyrr, men enn er ikki greitt, hvør skal vera vertur í 2009. Avgerð um hetta verður tikin á aðalfundi í altjóða oyggjaleikanevndini IGA, sum verður í Hetlandi, meðan leikirnir eru har.

Valið stendur millum walisisku oynna Ynys Mon, sum ikki hevur havt leikirnar fyrr, og Áland, sum var vertur í 1991. Estlendska oyggin Saareema vísti eitt skifti áhuga fyri at hýsa leikunum í 2009, men hevur síðani tikið seg aftur.

## *IOC*

Framvegis verður arbeitt við at vinna Føroyum altjóða og sjálvstøðuga viðurkenning í olympiskum høpi, og Ítróttasamband Føroya hevur endurnýggjað umsóknina um olympiskan limaskap.

Somuleiðis er gjørdur ein bóklingur, ið er sendur øllum norðurlondum og øðrum londum, serliga í Norðureuropa, ið kunnu hugsast at kunna gera sína ávirkan galdandi, tá føroyskur olympiskur limaskapur skal fremjast.

Eitt nú finst í hesum bóklingi løgfrøðilig grundgeving fyri, hví Føroyar hava rætt til olympiskan limaskap, og er hon eftir okkara tykki væl undirbygd og í tráð við bæði reglur og vanligan framferðarhátt í altjóða olympisku nevndini, IOC.

Somuleiðis eru í bóklinginum váttanir um føroyskan limaskap í níggju altjóða sersambondum og stuðulsbrøv frá ítróttasambondum og øðrum.

Sum heild skilja europeisku londini væl sjálvstøðugu støðuna hjá Føroyum, men av tí at IOC er stórur felagsskapur við mongum og ymsum áhugamálum, kann vera ilt at meta um, hvussu tað fer at gangast við umsókn okkara á hesum sinni.

## *Norðurlendskur felagsfundur*

Á árliga fundinum í Norðurlendsku Felagsnevndini fyri Ítróttasambond, sum var í Reykjavík í september 2004, vóru fleiri viðkomandi og áhugaverd evni til viðgerðar, serliga norðurlendski leikluturin í altjóða ítróttapolitikki og hvussu norðurlendskir ítróttafundir skulu skipast í framtíðini.

Danska ítróttasambandið legði upp til, at Norðurlendska Felagsnevndin tekur upp til viðgerðar møguleikan fyri at bjóða baltisku londunum til ein norðurlendskan-baltiskan ítróttafund, tí danska ítróttasambandið heldur tað vera stóran ítróttaligan fyrimun fyri norðurlond, fæst samstarv í lag við baltisku londini, Estland, Lettland og Litava.

Fleiri sjónarmið komu fram, og tað vísti seg eisini, at útnorðurlondini og skandinavisku londini ikki vóru á einum máli, umframt at flestu umboðini gjørdu vart við, at tey ikki kundu taka eina avgerð, uttan so at ítróttaliga leiðslan í avvarðandi londum hevði viðgjørt spurningin fyrst.

Norðurlendska Felagsnevndin samtykti, at ein arbeiðsbólkur við ítróttaforsetunum úr øllum norðurlondum skal tingast um málið og royna at



finna eina loysn, ið tey flestu kunnu taka undir við. Síðani er ætlanin at taka málið upp av nýggjum á komandi fundi í Norðurlendsku Felagsnevndini, sum verður í Norra í september í ár.

Hetta er tí ein spurningur, Ítróttasamband Føroya eigur at taka upp og at hava eina støðu til, tí eitt felags norðurlendsk-baltiskt samstarv kann hava vansar við sær fyri londini í Útnorðri. Baltisku londini hava eitt nú umfatandi altjóða limaskap, sum vit í Útnorði ikki hava, og á tann hátt kunnu hesi lond serliga verða áhugaverd hjá teimum størru norðurlondunum, ið hava hug at fara eystureftir, samstundis sum hetta helst ikki er so áhugavert hjá okkum.

## *ENGSO*

Ítróttasamband Føroya er við í ENGSO, sum er felagsskapur fyri europeisk ítróttasambond, ið leggur dent á bæði breidd og elitu, umframt at tey ungu sjálv verða tikin við upp á ráð og fáa ávirkan.

Serliga verður nógv gjørt burturúr, hvussu barna- og ungdómsítrótt kann verða best skipað í Europa, og roynt verður at finna eitt felags europeiskt stev, sum arbeiðast kann eftir. Síðani er tað upp til limalondini sjálv at seta tað í verk, sum samtykt verður á ENGSO-fundunum.

Gjørdar eru nakrar yvirskipaðar leiðreglur fyri barna- og ungdómsítrótt, ið fevna um eitt nú atgongd til ítrótt, útbúgving av venjarum og øðrum, so dygdin á ítróttaligu tilboðunum til børn og ung skal vera í lagi.

Hesar reglur verða í løtuni umsettar til føroyskt, og ætlanin er at senda sersambondunum og feløgunum hesar reglur, tá tað arbeiðið er liðugt.

## *Team Norden*

Annaðhvørt ár hava føroysk ungfólk frá fleiri ymsum ítróttagreinum verið við í ungdómstiltakinum Team Norden, og so verður eisini í ár.

Tó er nú tann broyting, at frá at hava verið um várið skal Team Norden-tiltakið nú vera um heystið. Eisini er ætlanin at hava tað samstundis og á sama stað sum Norðurlendska Felagsnevndin hevur sín árliga fund.

Hesin fundur verður í ár í Norra og helst í Bergen. Síðst vóru fimm føroysk ungfólk við til Team Norden og talið verður helst tað sama í ár.



# Heiður

## *Løgmaður verji hjá ítróttini*

Tað er siðvenja, at løgmaður er verji hjá ítróttini.



Ítróttasamband Føroya heitti tí á Jóannes Eidesgaard, tá hesin gjørdist løgmaður, um at gerast verji. Ítróttasamband Føroya fegnast um, at Løgmaður vildi ganga umbønini á møti. Í hesum sambandi fekk løgmaður handaða gullnál Ítróttasambands Føroya á lítlari samkomu í Tinganesi.

Tað hevur stóran týdning fyri føroyska ítrótt her heima og í altjóða høpi, at Føroya Løgmaður er verji. Eingin ivi er í, at løgmaður við sínum royndum sum íðkandi m.a. úr Tvøroyrar Bóltfelag, skilir viðurskiftini hjá ítróttini og vil virka henni at frama.

## *Jógvan á Lað heiðraður*

Í oktober 2004 heiðraði Ítróttasamband Føroya gamla HB-aran og landsliðsspælaran Jógvan á Lað við Heiðursskjali Poul E. Petersens, sum verður latið sum viðurkenning fyri stuðul og áhuga føroyskari ítrótt at frama.

Jógvan á Lað fekk heiðursskjalið eftir tilmæli frá Fótbóltssambandinum.

Í grundgevingunum fyri viðurkenningini verður millum annað víst á, at Jógvan á Lað í ein mansaldur hevur verið tvinnaður saman við virksemið í Havnar Bóltfelag og føroyskum fótbólti sum heild.
Jógvan á Lað hevur í virki sínum víst dygdir sum




ábyrgd, nærlagni og trúfesti, og hetta eru dygdir, ítróttarrørslan í Føroyum er grundað á.

## *100 ára stovningardagar*

Bæði í 2004 og 2005 eru rundir dagar í føroyska ítróttaheiminum, tí ikki færri enn fimm ítróttafeløg hava 100 ára stovningardagar. HB og KÍ fyltu 100 í fjør, og í ár standa VB, SÍ og MB fyri tørni.

HB markeraði sín runda dag við at vinna greipuna í fremstu fótbóltsdeildini hjá monnum og KÍ vann greipuna í fremstu deildini hjá kvinnum, eins og SÍ í vár vann greipuna í meistaradeildini í flogbólti. Somuleiðis hevur VB longu markerað sín dag við føroyameistaraheitinum í fremstu hondbóltsdeildini hjá kvinnum.

Tað er bæði hugaligt og stuttligt at staðfesta, at øll hesi feløg hava verið livandi og virkin í eina



heila øld, tí tað eru ikki mong feløg og mangir felagsskapir, ið megna at yvirliva so leingi. Felags fyri tey øll er, at tey eiga eina ríka søgu, ið ger tey til varðar og fyrimyndir fyri yngru feløgini, ið enn ikki hava nátt so høgan aldur.

Hetta ber boð um, at ítróttin stendur føroyskum hjørtum nær, umframt at øll hesi feløgini eru livandi vitnisburðir um, hvussu glæsiligt tað avrik er, ið liggur eftir tað stóra sjálvbodna ítróttaarbeiði, ið verður gjørt kring alt landið av túsundtals hjálpandi hondum.

## *Sverre Midjord gevst*

Nú Sverre Midjord aftan á 42 ár hevur gjørt av at gevast í sínum virki innan Ítróttasamband Føroya, fari eg persónliga at takka Sverra fyri sera gott samstarv øll árini, vit hava sitið í starvsnevnd og stjórn saman.

Í míni tíð sum forseti hevur Sverre øll árini sitið í nevndini sum varaforseti, og er tað eingin innan Ítróttasamband Føroya, sum hevur røkt hetta starv so leingi. Hann byrjaði sum stjórnarlimur longu í 1963, so hetta hevur verið ein sera trúgvur og góður Sverre, sum altíð hevur stuðlað føroysku ítróttini. Álit og trúfesti hevur sermerkt Sverra í okkara samstarvi, og hevur hann mangan verið mær góður í ráðum og staðið stinnur, tá brotasjógvar hava leikað á við hvørt, men tað eru tær ljósu og gevandi løturnar, sum vit minnast best til hesi árini. Nógv er hent og broytt upp gjøgnum tíðina, og eigur Sverre sanniliga sín lut í, at ítróttin í Føroyum er komin so langt, sum hon er komin.

Sverre havur alt sítt lív fingist við ítrótt, bæði sum íðkandi ítróttamaður og eisini sum virkin innan felagsarbeiði í heimbygdini Tvøroyri. Man kann við røttum siga, at hann hevur vígt sítt lív til ítróttina, og eg veit, at nógv eru honum sera takksom fyri tað.

Vegna Ítróttasamband Føroya vil eg eisini takka Sverra Midjord fyri trúfesti og dygdargott arbeiði, og fara vit at ynskja honum alt tað besta í framtíðini. Vónandi koma vit í framtíðini at síggja hann her í húsinum av og á, tí hann skal altíð vera vælkomin her niðan í ÍSF.

## *Endi*

Sum nevnt at byrja við, er neyðugt at verja og lívga ta gleði, sum mong hava av tí stóra ítróttaarbeiðinum kring alt landið, tí tað ger gerandisdagin bæði innihaldsríkan og gevandi.

Vegna starvsnevnd og stjórn í Ítróttasambandi Føroya fari eg at takka øllum feløgum og leiðarum fyri enn eitt ár við góðum samstarvi og dygdargóðum arbeiði.

Eisini ein tøkk til politiskar myndugleikar, bæði land og kommunur, Strandfaraskip Landsins, vinnulív, handilslív, fjølmiðlar og onnur, sum á ymsan hátt eru við til at skapa føroyskari ítrótt umstøður og fyritreytir at virka undir.

Síðst, men ikki minst, fer tøkkin til tykkum mongu kring landið, ið sjálvboðin við lív og sál eru til reiðar, tá ítróttin kallar til stórt ella smátt. Uttan tykkum var einki!

**Heðin Mortensen**
*forseti*

# Býti av landskassastuðli




# Býti av inntøkum frá ítróttarvedding




Stuðul Nordisk Ministerråd
6%
17%
10%
12%
17%
7%
7%
10%
14%
Hondbóltssambandið
Flogbóltssambandið
Róðrarsambandið
Ítróttarsamband fyri Brekað
Svimjisambandið
Judosambandið
Sambandið Fyri Súkkling og Triathlon
Frælsur Ítróttur Føroya
Skjótisambandið


Inntøkur
2%
2%
4%
15%
7%
43%
24%
1%
2%
Landskassastudningur
Stuðul til FSF
Ítróttarferðing v.m.
Limagjøld frá feløgum
Útvarp- & Sjónvarp Føroya
Ítróttarvedding
Nordisk Ministerråd
Ítróttarráðgeving
Aðrar inntøkur



## Heðin Mortensen forseti í fjórðingsøld

Tann 1. mars vóru liðin 25 ár síðani Heðin Mortensen varð valdur formaður í Ítróttasambandi Føroya. Tað var tó ikki nakar óroyndur maður, ið tók sæti í ovasta sessinum innan føroyska ítrótt í 1980.

Alla sína tíð hevur Heðin verið aktivur á ymsum økjum, og álitisstørvini hava verið mong. Hóast hann hevur verið aktivur í bæði lokal- og landspolitikki og knýttur at ymsum mentanararbeiði, so hevur fremsta frítíðaráhugamálið hjá honum tó altíð verið ítróttin. Áhugin fevnir fleiri ítróttagreinar, men tað er serliga kappróðurin, ið Heðin hevur havt alsk til. Áðrenn hann í 1979 kom í stjórn ÍSF sum starvsnevndarskrivari, var hann eitt nú formaður í Havnar Róðrarfelag árini 1973 til 1979 og sat eisini sum formaður í Tórshavnar Ítróttarráð frá 1975 til 1978.

Hesi árini Heðin hevur sitið sum formaður í ÍSF eru stórar broytingar hendar innan føroyska ítrótt. Nýskipanin, ið byrjaði við stovnsetanini av Fótbóltssambandi Føroya í 1979, tók veruliga dyk á seg í 1980. Heðin hevði ikki sitið sum formaður longri enn hálvt ár, so vóru seks sersambond aftrat sett á stovn. At sersambond vórðu sett á stovn hevði kollvelting við sær. Øll ábyrgd fyri fíggjarmálum hjá einstøku ítróttagreinunum hevði annars ligið hjá starvsnevnd og stjórn ÍSF, men við stovnanini av sersambondunum gjørdist einstøku ítróttagreinarnar sjálvstýrandi eindir innan fyri stóra



felagsskapin og øll ábyrgd fyri dagligum rakstri varð flutt til ymsu sersambondini. Uppgávan hjá sjálvum meginfelagsskapinum broyttist eisini samsvarandi og er m.a. nú at fremja samstarv um ítróttamál við landsmyndugleikar og aðrar myndugleikar í landinum, umboða Føroyar í ítróttamálum í viðurskiftum við aðrar tjóðir, her undir at stuðla og verja olympisku rørsluna og umboða føroyska ítrótt í olympiskum høpi, innan teir karmar, sum Altjóða Olympiska Ráðið skipar. Eisini skal ÍSF seta í gongd og skipa fyri tiltøkum at breiða út ítróttina til øll fólk uttan mun til aldur, útbúgving, kyn og sosiala støðu, samsvarandi ynskjunum og tørvinum hjá tí einstaka og eisini menna umstøðurnar hjá teimum, ið hava trupul ítróttalig viðurskifti.

Nógv er gjørt hesi árini Heðin hevur havt ovastu leiðsluna um hendi. Tá hann tók við vóru níggju ítróttagreinar umboðaðar í Ítróttasambandinum, meðan talið í dag er vaksið til 24, og eru hesar allar skipaðar í 15 ser- og deildarsambond. Eisini er talið av feløgum í formanstíð hansara økt úr 71 upp í 107 og eru í dag fleiri enn 15.000 íðkandi limir skrásettir í felagsskapinum.

Menningin innan ítróttina hevur hesi ár verið stór.

Meira enn helmingurin av sersambondunum eru sjálvstøðugir limir í altjóða og millumtjóða ítróttasamgongum og hevur stórur dentur verið lagdur á at geva føroyingum høvi at vera við í millumlanda kappingum. Ítrótt er vorðin fastur partur av føroyska gerandisdegnum. Ítróttakappingar eru alt árið, og umstøðurnar at íðka ítrótt eru góðar og onkursvegna eru nærum allir føroyingar á einhvønn hátt knýttir at ítróttini.

Miðvísa arbeiðið, ið er gjørt innan Ítróttasambandið, sersambond og deildir, hevur borið ávøkst. Útbúgvingarætlanir hava havt støðuga menning við sær og bæði innan íðkan og fyriskipan er støðið høgt. Heimligar kappingar roynast góðar og spennandi og føroysk ítróttafólk luttaka javnan í millum- og altjóða kappingum. Møguleikar eru m.a. at taka lut í oyggjaleikum, smálandakappingum, kappingum um EM ella HM o.s.fr., so fyri tann, ið hevur hug og hegni er møguleiki fyri nógvum avbjóðingum. Heðin hevur altíð lagt dent á, at neyðugt er við góðum umstøðum. Bæði fyri íðkandi og fyriskiparar. M.a. eru hølisumstøðurnar hjá ÍSF bøttar munandi. Húsini, ið upprunaliga vóru felagshøli hjá hondbóltsfelagnum Neistanum, eru í fleiri umførum umvæld og víðkaði. Hóast tað ikki er nóg rúmsátt at hýsa øllum virkseminum, so ber til við liðiligheit, men nóg gott er tað ikki og er eitt av nógvu málunum, ið Heðin hevur á skránni, útvegan av nýggjum hølum.

Hóast tað av og á hevur brotið í bæði borð, so hevur Heðin roynst arbeiðssamur hugsjónarmaður innan ítróttina. Nógv er komið á skaftið og trivið kundi verið i nógv, men hetta vildi kravt nógva rúmd og er partvíst eisini óneyðugt, tí avrikini tala fyri seg sjálvi. Tó kann í stuttum okkurt verða tikið fram. Eitt nú, at í samband við fimti ára stovningarhald ÍSF í 1989 varð roynt at knýta ítróttina og annan part av mentanini, nevnliga sjónleikin, tættari at hvør øðrum, tá leikurin Framá var táttur í sjálvum jubileumshaldinum. Eitt gott hugskot, ið prógvaði, at væl ber til at arbeiða tvørnámsliga um mentanarmørk. Eitt hugskot, ið kann verða øðrum til fyrimynd. Ásannandi at nógvur peningur skal til um luttakast skal í fleirtjóða kappingum, var Heðin við at seta stuðulsfelagsskapin Framá Føroyar á stovn, og seinni var hann oddamaður fyri at fáa donsku tipstænastuna at virka í Føroyum, soleiðis at føroysk ítrótt kundi fáa part av yvirskotinum. Ein roynd, ið hevur givið bæði ítróttarørslu, umgdómsarbeiði og øðrum mentanararbeiði tryggari fíggjarkarmar at virka undir.

At hann so eisini hevur verið við at fingið ítróttaferðir, trygging av ítróttafólkum, ítróttaráðgevaraskipan o.a. í trygga legu er nakað, sum í dag verður roknað sum ein sjálvfylgja.

Nógv stig eru tikin og í nógvum førum er vunnið á mál. Men framvegis eru nógvar avbjóðingar eftir. Lóg ÍSF er broytt og samsvarar í dag øllum teimum krøvum, sum IOC, altjóða olympiska ráðið, setur, men enn er limaskapurin ikki fingin. Givið verður tó ikki á hond og stríðið fyri at vinna føroyskum ítróttafólkum limaskap heldur fram.

Vit, ið kenna Heðin vita, at tað argar hann, at tað ikki eydnaðist at fáa eitt sonevnt »multiítróttastadion« í Gundadali. Eftir hansara tykki vildi hetta verið til stórt gagn fyri allar borgarar í Tórshavn og sera gott fyri fólkaheilsuna. Hetta mál hevur einki við starv hansara sum ÍSF-forseti at gera, men verður bert nevnt fyri at vísa, at eisini í politiska yrki hansara hevur ítróttahugsjónin havt rúmd og merkt gerandisdagin. At málið um

rennibreyt og betraðar umstøður til frælsa ítrótt neyvan er slept, er so onnur søga.

Nógvu broytingarnar, ið hendar eru innan føroyska ítróttaheimin seinastu 25 árini, eigur Heðin sín stóra og virkna lut í, og fyri trúgva og drúgva virkið sítt innan ÍSF hevur hann fingið øll tey heiðursmerki, ið Ítróttasambandið gevur. Heðin hevur fingið silvur- og gullnál ÍSF umframt gullmerki við bjálka. Eisini hevur hann fingið heiðurskross Ítróttasambandsins fyri arbeiði sítt til frama fyri føroysku ítróttafjøldina. Umframt hetta hevur hann fingið heiðurskross frá íslendska, danska og svenska ítróttasambandinum og er eisini riddari av Dannebrog av 1. grad.

## Síðstu 25 ítróttaárini í stuttum

### *1980-1981*

ÍSF hevur 71 limafeløg. Allar deildirnar undir ÍSF gerast sersambond, og eru tær Fimleikasamband Føroya, Flogbóltssamband Føroya, Róðrasamband Føroya, Borðtennissamband Føroya, Hondbóltssamband Føroya, Badmintonsamband Føroya, Svimjisamband Føroya, Judosamband Føroya og Ítróttasamband Fyri Brekað. Sigrid Dam úr Havn verður sett sum dagligur skrivari í ÍSF.

### 1981-1982

ÍSF-húsið er liðugt útbygt. Fyrsti norðurlendski felagsfundur verður hildin í Føroyum við 40 luttakarum, harav átta eru úr Føroyum. Farið varð undir útgávu av navnabók og nýútgávu av Ítróttatíðindum. Lógirnar hjá ÍSF verða endurskoðaðar.

### *1982-1983*

Skipan við fríferðum hjá ítróttafólki við Strandfaraskipum Landsins kemur í gildi sum royndarskipan við blokkum, har nøvn á ítróttafólkum og -leiðarum skulu skrivast á, og síðani ferðast hesi frítt. Olympiska Nevnd Føroya verður sett á stovn og fer undir arbeiðið at vinna Føroyum sjálvstøðugan olympiskan limaskap. Framá Føroyar



verður stovnað sum samtak til at stuðla føroyskari luttøku í millumtjóða ítróttakappingum.

## *1983-1984*

Talið á limafeløgum í ÍSF er nú komið upp á 86. Petur Petersen úr Klaksvík og Thurid Petersen úr Havn standa seg væl í rennikappingum uttanlands. Ítróttasamband Føroya ger saman við Føroya landsstýri partafelag, sum skal skipa fyri ítróttavedding í Føroyum.

## *1984-1985*

Talið á limafeløgum kemur upp á 95. Ítróttavedding fer í gongd í samstarvi við Postverk Føroya, og á veddingarseðlunum eru annaðhvørt seks kappróðrar ella 12 fótbóltsdystir. ÍSF heldur stjórnarfundir úti á bygd, og tann fyrsti er í Trongisvági.

## *1985-1986*

Ítróttaveddingin dettur niðurfyri, tí úrslitið er ov vánaligt. Fyrstu Oyggjaleikirnir eru á Isle of Man, har føroysku ítróttafólkini vinna tvey silvurmerki og eitt bronsumerki. Føroyar bjóða seg fram at hýsa leikunum í 1989. Starvsfólkatalið á ÍSF-skrivstovuni verður trífaldað, tá John Kjær og Sofus Johannesen verða settir í parttíðarstarv.

## *1986-1987*

Framá Føroyar tekur dik á seg við 12 sponsorum, sum stuðla við 50.000 krónum í part. ÍSB-svimjarar vinna fýra gullmerki í heimsmeistarakappingini fyri brekað, sum er í Göteborg í Svøríki.

## *1987-1988*

Filmur verður gjørdur um ÍSF og ítróttavirksemi í landinum, umframt at lýsa Føroyar sum land væl og virðiliga, og hann verður vístur bæði í Norðurlondum, USA, Sovjetsamveldinum og Australia. Eini 100 føroysk ítróttafólk eru við á Oyggjaleikunum á Guernsey, har Føroyar vinna eitt gullmerki, tvey silvurmerki og fimm bronsumerki.

## *1988-1989*

ÍSF fyllir 50 ár, og hetta verður hildið við stórfingnum minnisriti, bandútgávu við føroyskum sangum, serligum ungdómsleikum og sjónleikinum »Framá«,



ið verður framførdur á palli. Oyggjaleikirnir eru størsta ítróttatiltak í Føroya søgu og eydnast sera væl, og nýggja stadionøkið á Svangaskarði á Toftum verður tikið fram sum eitt prýði og ein varði fyri allar Føroyar. Ítróttaliga hilnast sera væl, tí Føroyar gerast triðfremst av 13 oyggjasamfeløgum við 13 gull-, 5 silvur- og 10 bronsumerkjum. ÍSB-svimjarar vinna á paralympisku leikunum í Seoul í Suðurkorea fyrstu olympisku heiðursmerkini.

## *1989-1990*

ÍSF hevur nú yvir 100 limafeløg og umleið 12.000 aktivar limir. Ítróttin merkir kreppuna í føroyska samfelagnum á egnum kroppi, tá landsstýrið skerjir játtanina til ÍSF á løgtingsfíggjarlógini. Fótbóltsfelagið í Sandoynni, B71, tekur øll á bóli og vinnur sum uppflytari føroyameistaraheitið í bestu mansdeildini.

## *1990-1991*

ÍSF hevur nú yvir 110 limafeløg, sum umboða 19 ítróttagreinar. Føst oyggjaleikanevnd verður vald. Føroyska manslandsliðið í fótbólti setir Føroyar á heimskorti við einum braki, tá tað »á heimavølli« í Landskrona eydnast at vinna 1-0 á Eysturríki við máli, sum Torkil Nielsen skjýtur. Og hóast Føroyar tapa 1-4 ímóti Danmark í Ítróttaparkini í Keypmannahavn, »fer maður av húsi« úr Føroyum at stuðla liðnum, ið hevur syrgt fyri Føroya størstu ítróttasensatión nakrantíð.

## *1991-1992*

Íðkaðar verða nú 20 ítróttagreinar undir ÍSF. Elsta fótbóltsfelag í landinum, Tvøroyrar Bóltfelag, sum er stovnað í 1892, fyllir 100 ár. Oyggjaleikir eru á Álandi, og Føroyar við tilsamans 180 ítróttafólkum vinna 6 gull-, 10 silvur- og 11 bronsumerki. Givið verður út ritið »Ítrótturin fram til ár 2000«, ið umrøður framtíðina hjá føroyskari ítrótt. Álagt verður róðrarfólki at nýta trygdarvest umborð á báti, bæði undir venjing og í kappingum.

## *1992-1993*

Talið á aktivum ítróttafólkum er farið upp um 15.000. Fyri aðru ferð eru Føroyar vertir fyri Norðurlendskum Felagsfundi. Ítróttafólk fáa ein hvøkk, tá Strandfaraskip Landsins steðga øllum fríferðum, tí játtanin í hálvrunnum ári longu skal vera uppbrúkt, sum tó seinni vísir seg ikki at vera rætt. Sundalagsstevnan verður sætta FM-stevnan í kappróðri, og skiftir hon millum Kollafjørð, Hósvík og Hvalvík.

## *1993-1994*

Oyggjaleikir eru á Isle of Wight, har Føroyar vinna 5 gull-, 5 silvur- og 13 bronsumerki. GÍ vinnur fyrsta føroyameistaraheitið í mansfótbólti í eini røð av fýra. At mong í kreppuni eru flutt av landinum og arbeiðsloysið er stórt, merkist millum annað á, at alsamt færri geva vetrarítróttagreinunum ans.

## *1994-1995*

Fleiri ítróttafeløg gera vart við, at tey eru komin í trupulleikar av meirvirðisgjaldinum, ið tyngir bæði rakstur og umsiting. Í eini roynd at menna



samstarv millum ferðavinnu og ítrótt bjóðar Ferðaráð Føroya ítróttafeløgum at manna ein bás á ferðavinnustevnuni Vest Norden Travel Mart í Havn.

## *1995-1996*

Starvsnevndin í ÍSF tekur upp nýggjan tátt, at hitta ítróttafeløgini kring landið á máli »á heimabeiti«, og ein beinleiðis avleiðing av hesum verður skeiðvirksemi fyri nevndarlimir í feløgunum. Oyggjaleikir eru í Gibraltar, har Føroyar fáa higartil bestu heiðursmerkjaúrtøkuna við 10 gull-, 14 silvur- og 15 bronsumerkjum.

## *1996-1997*

ÍSF umboðar 23 ítróttagreinar, sum næstan er ein tvífalding eftir bara 15 árum. Fýra nýggj sersambond verða sett á stovn: Skjótisamband Føroya, Ríðingasamband Føroya, Deildarsambandið fyri súkkling og frælsa ítrótt og Deildarsambandið fyri nýstovnaða ítrótt, og samstundis fer talið á stjórnarlimum upp í 17. Eftir tógvið stríð í fleiri ár fæst í lag samstarv við Dansk Tipstjeneste um ítróttavedding í Føroyum, og 18 terminalar verða settir upp kring landið. Heðin Mortensen verður heiðraður av íslendska ítróttasambandinum við heiðurskrossi. Mentanarálitið »Avmarkaður marknaður«, sum Mentamálaráðið tekur stig til, verður lagt fram fyri almenningin, men uttan eitt einasta orð um ítrótt!

## *1997-1998*

ÍSF metir um virðið á sjálvbodna ítróttaarbeiðinum, tá venjarar og onnur lønt fólk ikki eru tikin við, og roknistykkið endar uppi á einari mettari upphædd, sum liggur um 18 milliónir krónur. Oyggjaleikir eru á Jersey, og har vinna Føroyar 5 gull-, 10 silvur- og 22 bronsumerki.

## *1998-1999*

ÍSF verður 60 ár, og í ársfrágreiðingini hetta árið verður nokk so fitt gjørt burturúr at greiða frá, hvussu ítróttasambandið sá dagsins ljós í 1939. Skeiðini fyri nevndarlimir í ítróttafeløgum vinda



upp á seg, og ÍSF bjóðar nevndarlimum eitt 16 tíma skeið í tveir dagar. ÍSF samtykkir stevnumið um rúsdrekka og ítrótt, ið leggur upp til, at ungfólk skulu sleppa at íðka ítrótt í einum rúsfríum umhvørvi.

## *1999-2000*

Fyrstu pengarnir frá Dansk Tipstjeneste í sambandi við ítróttaveddingina koma til ÍSF, harav 1,8 milliónir krónur eru fyri árini 1997/1998 og 3,3 milliónir krónur fyri árið 1999. Oyggjaleikir eru á Gotlandi, har 92 íðkandi ítróttafólk eru við, og ítróttaliga úrtøkan hjá Føroyum er sjey gull-, 12 silvur- og níggju bronsumerki. Ein ÍSF-reglugerð um dopingeftirlit verður samtykt, og er hon grundin undir framhaldandi fyribyrgjandi arbeiðinum hjá ÍSF móti doping. ÍSF fær sína egnu heimasíðu á internetinum. Jógvan Arge, Hans Holm, Tórleif Sigurðsson, Sverre Midjord og Heðin Mortensen fáa heiðurskross ÍSF.

## *2000-2001*

ÍSF fevnir nú um 24 ítróttagreinar, umboðaðar av 14 ser- og deildarsambondum. Norðurlendsku ítróttasambondini og norðurlendsku olympisku nevndirnar umrøða á fundi í Grønlandi trupulleikarnar í sambandi við vantandi motión hjá børnum. Róðrarsamband Føroya tekur fyrsta stigið móti altjóða limaskapi í altjóða róðrarsambandinum FISA. Fremsta liðið hjá VB vinnur felagnum í Vági fyrsta føroyameistaraheitið í mansfótbólti.

## *2001-2002*

ÍSF samtykkir nýggja »Evstalóg fyri Ítróttasamband Føroya«. Oyggjaleikir eru á Isle of Man, har tilsamans 104 ítróttafólk eru við til at vinna Føroyum tilsamans 40 heiðursmerki, ið eru 15 gull-, 12 silvur- og 13 bronsuheiðursmerki. ÍSB-svimjarar fáa góð úrslit og heiðursmerki á paralympisku leikunum í Sydney í Australia. Heidi Andreasen verður innstillað til Laureus World Sports Awards í Monaco sum eitt av heimsins fimm bestu ítróttafólkum við breki. Dopingeftirlitisnevndin fer til verka at fyrireika dopingroyndir í Føroyum. Á øðrum sinni verður mentanarálit lagt fram, »Mentan og menning«, men heldur ikki hesa ferð eitt orð um ítrótt! Birgit Hestoy á Tvøroyri og Niels Jákup Jakobsen í Havn verða heiðrað við »Heiðursprógvi Poul E. Petersens«.

## *2002-2003*

Langt um leingi vísir landsstýrismaðurin í mentamálum ítrótti ans, og settur verður ein arbeiðsbólkur við umboðum frá Mentamálaráðnum og Ítróttasambandi Føroya at skriva eitt ítróttaálit. Avtala verður gjørd við Anti Doping Danmark, so ÍSF verður ført fyri at gera dopingroyndir á tryggum og dygdargóðum stigi, og í september 2002 verða fyrstu føroysku dopingroyndirnar tiknar – allar negativar! Sølvi Reinert Hansen verður settur sum ítrótta- og ungdómsráðgevi. Nýtt sersamband, Frælsur Ítróttur Føroya, verður sett á stovn, og samstundis broytir Deildarsambandið fyri Súkkling og Frælsan Ítrótt navn til Sambandið fyri Súkkling og Triathlon. ÍSF er við á fyrsta aðalfundinum í ungdómsdeildini hjá ENGSO, sum er felagsskapur fyri europeisk ítróttasambond. Kaj Aage Troest í Saltangará verður heiðraður við »Heiðursprógvi Poul E. Petersens«.



## *2003-2004*

Stígur kemur í arbeiði at gera eina skipan, ið kann hjálpa føroyskum ítróttafeløgum at fáa venjara- og spælarastyrk uttan úr heimi, tá innlendismálaráðið noktar fyri at viðmæla útlendskum ítróttafólkum uppihaldsloyvi í Føroyum, sum hava ófaklært arbeiði við síðuna av ítróttaliga virkseminum. Dopingeftirlitið er komið í fasta legu, og í 2003 verða 21 dopingroyndir gjørdar – allar negativar! Oyggjaleikir eru á Guernsey, har 160 føroysk ítróttafólk vinna Føroyum 6 gull-, 10 silvur- og 12 bronsumerki. ÍSF endurnýggjar umsóknina um altjóða olympiskan limaskap, so hon á fullfíggjaðan hátt grundgevur fyri føroyska ynskinum, umframt at mong viðmæli frá altjóða sersambondum og øðrum eru viðløgd. ÍSF heiðrar formenninar í donsku og íslendsku ítróttasambondunum, ávikavist Kai Holm og Ellert B. Schram, við gullnál ÍSF. Ninna Reinert Ørvarodd verður sett í starv sum skrivstovufólk hjá ÍSF.

## *2004-2005*

Eingi framstig henda í útlendingapolitikkinum, sum tó fær nógva umrøðu og heldur fram eftir gamla leistinum, tó við einum kravi til ítróttafeløg um, at tey skulu fíggja 60 prosent av inntøkuni hjá útlendskum ítróttafólkum. Í 2004 fylla HB og KÍ 100 ár, og í 2005 kunnu VB, SÍ og MB halda sínar 100 ára dagar. Løgtingið samtykkir nýggja dopinglóg, hvørs endamál er at avmarka útbreiðsluna av dopingevnum, sum við lógini verða gjørd ólóglig. Petur Elias Petersen tekur við sum nýggjur stjóri í smápartafelagnum Ítróttavedding, tá Heðin Mortensen biður um farloyvi, eftir at hann er blivin borgarstjóri í høvuðsstaðnum. Jógvan á Lað í Havn verður heiðraður við »Heiðursprógvi Poul E. Petersens«.

Heðin Mortensen hevur tann 1. mars 2005 siti sum forseti í ÍSF í 25 ár.





# Eitt lív í ítrótti

Í ár eru liðin 42 ár, síðani Sverre Midjord kom í stjórn Ítróttasambands Føroya, og hevur hann eisini í ár 27 ár á baki sum varaforseti ÍSF.

Tað eru nøkur fólk, ið seta sær varandi spor, líka mikið hvat tey so enn takast við. Ikki tí at tey hava ætlanir um at gera vart við seg sjálvi, men av tí at tey við eldhuga takast við ymiskt, ið hevur áhuga teirra. Hetta verður ofta so fastur og stórur partur av lívi teirra, at tey mangan gerast sammerkt við áhugamálini.

Ein av hesum persónum er Sverre Midjord. Sverre hevur alla sína tíð verið aktivur á ymsum økjum, og álitisstørvini hava verið mong og krevjandi. Hóast aktivur í bæði lokal- og landspolitikki, ágrýtin samfelagskjakari, so er fremsta frítíðaráhugamálið hjá Sverra ítróttin. Ítróttin og ítróttararbeiði hava altíð verið fastgrógvnir partar av lívi hansara, og hevur hann verið virkin í fleiri ítróttagreinum. Sverre hevur m.a. roynt seg í bæði hond- og fótbólti, men tað er tó borðtennis, ið hevur fremsta áhuga hansara. Ikki er ov nógv sagt, at hann eigur sín stóra lut í, at hesi ítróttagrein hevur verið lív lagað í Føroyum. Sjálvur var hann ein teirra, ið legði lunnar undir føroyskt borðtennis, og framvegis er hann, hóast farin um tey sjeyti, aktivur spælari. Sum borðtennisspælari er Sverre besta tekin um, at aldurin er ikki nøkur forðan hjá tí, ið hevur hug og vilja at takast við ítrótt. Sverre hevur gjøgnum árini - heilt fram til í ár - vunnið hópin av FM og heiðursmerkjum í borðtennis, men minni kent er kanska, at hann eisini hevur verið føroyameistari í hondbólti við TB í 1953.

Sverre er tvøramaður av heilum huga - eingin ivi um tað. Eingin skal siga nakað um Tvøroyri, ið ikki hóvar honum, so er hann til reiðar at verja heimbýin á einhvønn hátt í orð og tal. Og ítróttafeløgini í heimbygdini hevur hann tænt væl. Borðtennisfelagið hevur hann stjórnað í fleiri umførum, og í TB hevur hann verið virkin. Hann var formaður í Tvøroyrar Bóltfelag frá 1970 til 1972, og var venjari hjá 1.deild árini 1968 til 1971. Annars virkaði hann eisini sum ungdómsvenjari innan felagið í mong ár.

Fyri onkran tykist alskur Sverra til heimstaðið nærkast reinum trábeitni, men tað er tó ikki trongskygni, ið hevur eyðkent Sverra. Hann hevur altíð verið til reiðar at tæna allari teirri føroysku ítróttafjøldini. Altíð til reiðar at taka eitt tak har brúk hevur verið fyri tí, og er tað serliga á fyriskipanaðarliga økinum, at hann hevur gjørt vart við seg innan landsítrótt. Meira enn hálvan mansaldur hevur hann verið virkin í ÍSF, og fyrsta desember eru liðin 42 ár síðani Sverre á fyrsta sinni kom í stjórn Ítróttasambands Føroya. Samstundis kann Sverre í ár eisini hátíðarhalda 27 ára starvsdag sín, sum varaforseti ÍSF.

Í starvstíð síni í ÍSF hevur Sverre upplivað og verið partur av nógvum broytingum. Drúgvu ársaðalfundirnar, ið kundu vara fleiri dagar, tí hvørt smámál skuldi viðgerast á sjálvum aðalfundinum. Hetta tí at einstøku ítróttagreinarnar lógu beinleiðis undir ÍSF, og ósemjur um kappingarmál tí eisini vórðu løgd fyri aðalfund ÍSF til viðgerðar. Síðani deildarskipanina, tá skift varð sundur í deildir, ið tóku sær av ymsu ítróttagreinunum. Og so seinni aftur sersambondini, sum nú taka sær av egnum ítróttagreinum.

Menningin innan ítróttina hevur hesi ár verið stór. Talið av ítróttagreinum er økt munandi, og meira enn helmingurin av sersambondunum eru sjálvstøðugir limir í altjóða og millumtjóða ítróttasamgongum. Stórur dentur hevur verið lagdur á at geva føroyingum høvi at vera við í millumlanda kappingum, og er ítrótt eisini vorðin fast integreraður partur í føroyska gerandisdegnum. Nú eru ítróttakappingar alt árið, og umstøðurnar at íðka ítrótt eru góðar. Ítróttahallir og ítróttavøllir av ymsum slag eru at finna um alt landið, og onkursvegna eru nærum allir føroyingar á einhvønn hátt knýttir at ítróttini. Talið av íðkandi er nú oman fyri 15.000.

Alla hesa broyting, ið er hend innan føroyska

ítróttaheimin, hevur Sverre verið partur av og átt sín virkna lut í, og fyri trúgva og drúgva virkið sítt innan ÍSF hevur Sverre fingið øll tey heiðsursmerki, ið Ítróttasambandið gevur. Sverre hevur fingið silvur- og gullnál ÍSF umframt gullmerkið við bjálka. Eisini hevur hann fingið heiðurskross Ítróttasambandsins fyri arbeiði sítt til frama fyri føroysku ítróttafjøldina.

ÍSP

1939

FØROYAPRENT · TEL. 314 555